# Reglur fyri býtið av Gramex-samsýning - Framleiðslufelagði

**Inngangur**

Gramex krevur inn samsýning fyri at spæla útgivnan tónleik í føroyskum kringvarpi (útvørp og sjónvørp), handlum, á veitingarstøðum, telefonlinjum og øðrum almennum støðum, har tónleikur verður spældur sambært loyvi frá Mentamálaráðnum. Inntøkurnar frá teimum føroysku viðskiftafólkunum er bæði fyri at spæla føroyskt, danskt og útlendskt tilfar.

Tá ið fyrisitingarkostnaðurin er drigin frá, fara 50 % av inntøkunum til føroykst tónleikalív, soleiðis at 25 % fara til útinnandi tónleikarar og 25 % til teirra, ið framleiða tónleik. Hini 50 % verða býtt sundur millum føroyskt, danskt og útlendskt tónleikatilfar sambært teimum frágreiðingum, sum Gramex fær frá donskum kringvarpsstøðum (útvørp og sjónvørp).

Viðtøkurnar niðanfyri eru um býtið til útinnandi tónleikarar í Føroyum.

---

**Viðtøkur**

1) Í Føroyum verður gramexsamsýningin býtt millum framleiðararnar sambært upplagstølunum hjá tí einstaka útgevaranum. Við atliti at øllum tí árliga upplagstalinum fyri útgávur í Føroyum verður ein árligur stykkjaprísur útroknaður. Gramexsamsýningin hjá framleiðaranum verður roknað út við at falda tað árliga upplagstalið hjá framleiðaranum við ársins stykkjaprísi.

2) Framleiðararnir skulu hvørt ár í januar lata Framleiðslufelagnum skjalprógvaðar upplýsingar um upplagstøl.

3) Nevndin í Framleiðslufelagnum umsitur býtið. Rættindabólkurin hjá nevndini í Gramex samtykkir reglurnar fyri býtið, og reglurnar verða síðan lagdar fyri alla nevndina. Framleiðslufelagið kann tilnevna ein skrivara til at røkja fyrisitingina av býtinum. Arbeiðið hjá skrivaranum og Framleiðslufelagnum er ólønt.

4) Framleiðslufelagið kann draga veruligar útreiðslur til fyrisitingina (skrivstovulutir, porto og lýsingar) frá, tó í mesta lagi 10 % av ársins býtisupphædd.

5) Framleiðslufelagið skal hvørt ár innan 1. juli senda Gramex roknskap fyri pengar, ið eru fingnir undanfarna kalendaraár. Framleiðslufelagið kann í serligum førum flyta pengar frá einum kalendaraári til kalendaraárið eftir, tó soleiðis at fingnar og útbýttar upphæddir skulu javnviga í einum trý ára skeiði.

---

**Samtykt**

Soleiðis samtykt av rættindabólkinum hjá nevndini í Gramex.

8/12 2010.

---